stubbar uttaneftir

KGB-agentar í Hálandi

Talið av sovjetiskum agentum í Hálandi er tvífaldað seinastu tvey-trý árini, skrivar dagblaðið De Telegraf í Amsterdam. Tilsamans hevur sovjettiska trygdartænastan umleið 60 agentar í Hálandi __ ella umleið 10 ferðir so nógvar sum USA, heldur blaðið.

Spania og felagsmarknaðurin

Tann spanski uttanríkisráðharrin, José Areilza, skal 17. februar í Bruxelles møta felagsmarknaðarkommissiónini. Hann skal samráðast um sambandið millumfelagsmarknaðin og Spania.

Í túsundatali av sponskum arbeiðsmonnum fóru aftur til arbeiðis í seinastu viku eftir at hava veri í verkfalli í tvær vikur. Samstundis fordømdi spanski arbeiðaraflokkurin, PSOE, stjórnina í Madrid fyri hennara vinarliga verjusamarbeiði við USA.

USA og Sovjet javnbjóðis sterk

Sovjetsamveldið hevur seinastu árini økt munandi um strategisku raketorku sína. Soleiðis standa tey bæði risaveldini næstan á jøvnum. Hetta segði amerikanski verjumálaráðharrin Rums__ feild starvsbrøðrum sínum á einum kjarnorkufundi í Nato í farnu viku.

Navarro krevur ábøtur

Tann spanski forsætisráðharrin setti sunnudagin fram krøv um, at ymiskar liberaliseringar vórðu gjørdar. Hesar ætlanir hava møtt harðari mótstøðu frá høgraveinginum, meðan Navarro hevur fingið stuðul til ábøturnar m.a. úr USA. Forsætisráðharrin skal í eini røðu framleggja ætlanirnar í tí spanska tjóðartinginum Cortes. Navarro hevur vónir um, at ætlanirnar vilja føra Spania á hædd við tey flestu av demokratisku londunum í Vesturevropa, limirnar í Nato og eisini føla seg væl millum londini í Felagsmarknaðinum.



Humphrey nærkast Ford

Tær seinastu veljarakanningarnar í USA frammanundan forsetavalinum, ið skal haldast til heystar, vísa, at tann demokratiski senatorurin Huber Humphrey hevur tikið seg nógv framm á Ford - hóast Humphrey ferð eftir ferð hevur sagt, at hann ikki letur seg stilla upp.

Eftir kanningini fær Humphrey 40 pst, meðan Ford fær 48 pst. Fyri einum mánaða síðani fekk Ford 51 og Humphrey 49 pst.

— — —

Bretski uttanríkismálaráðharrin, James Callaghan, sigur, at hann stórliga ivast í tankanum um at bita tey nýggju felagsmarknaðarlondini í rik og fátæk lond. Í slíkum føri fara tey ríku londini, sum eru før fyri eini økonomiskari og valutariskari integratión, at skunda sær og ikki bíða eftir teimum fátæku londunum. Viðmerkingin frá bretska uttanríkismálaráðharranum er tann fyrsta almenna bretska viðmerkingin til sokallaðu Tindemans-frágreiðingina, ið tann belgiski forsætisráðharrin Leo Tindeman hevur gjørt.

Í frágreiðingini heitir hann m.a. tey sterku londini um at seta á fyri at skapa eina økonomiska og valutariska integratión, hóast at tey fátæku londini fara at darla aftur úr.

Grikkar í felagsmarknaðin

Kommissiónin hjá felagsmarknaðinum fer óivað í vikuni at siga gott fyri, at samráðingar kunnu takast upp um griskan limaskap, siga keldur í Bruxelles.



Navarro og Kissinger hildu fund leygardagin

Bjartskygni um SALT

Politisku eygleiðararnir í Vestureuropa eru bjartskygdir um tær strategisku vápnasamráðingarnar (SALT), eftir at Henry Kissinger uttanríkisráðharri hevur greitt frá samráðingarúrslitum hansara í Kreml í farnu viku



Uttanríkisráðharrarnir: Gromyko og Kissinger

Næstan allir Nato uttanríkisráðharrarnir vóru hjástaddir á Natohøvuðsskrivstovuni, tá Kissinger kom til Bruxelles frá Moskva fyri at mota Nato partamonnum sínum.

Keldur siga, at tað var ikki stórvegis munur millum vónirnar til SALT, ið Kissinger læt orð falla um, tá hann var í Danmark týsdagin í farnu viku, og tað, sum hann segði eftir samráðingarnar við aðalskrivaran Leonid Bresjnev í Kreml seinni í vikuni.

Væl vitandi amerikanskar keldur siga, at Sovjet er sinnað til at lækka loftið á teimum strategisku rakettunum og flogførunum til 2160 móti teimum 2400, ið Bresjnev og Ford samdust um á toppfundinum í Vladivostok í november 1974.

Bresjnev til USA í apríl

Amerikanarar hava kravt, at tað sovjetiska bumbuflogfarið, »Backfire«, skuldi koma inn undir loftið, men fyri at koma uttan um tað vildu russar heldur lækka loftið. Orsøkin er, at sovjetiskastjórnin heldur fast við, at »Backfire« bumbuflogfarið er ikki eitt strategiskt vápn.

Sovjetisk-amerikanska frágreiðingin frá fundinum slær fast, at tað eru gjørd stór framstig ímóti eini nýggjari SALT-avtalu. Tær báðar stjórnirnar halda fram við at finna loysningar til óloystar trupulleikar, ið báðar stjórnirnar kunnu góðtaka, stendur í frágreiðingini.

Keldur úr Moskva søgdu eftir fráferðina hjá Kissinger úr Moskva, at møguliga fer Bresjnev til Washington í apríl mánaða fyri at skriva undir ta nýggju SALT-avtaluna við Ford forseta.

Russar vilja ikki taka herlið aftur

Kissinger greiddi eisini ráðharrastarvsbrøðrum sínum frá, hvat annað hann hevði samráðst um við sovjetisku leiðararnar:

1) Miðeystur:

Tað kemur neyvan linni í støðuna í næstum, eins og heldur ikki kann væntast, at Geneveráðstevnan verður kallað til fundar í næstum millum teir ymsu partarnar.

2) Samráðingar um minking av herliðunum í Europa:

Russar góðtaka ikki uppskotið frá Nato um at taka aftur 68.000 hermenn og 1700 stríðsvagnar úr Eystureuropa mótvegis at USA tekur aftur 29.000 mans úr Vestureuropa, men russar vilja brúka uppskotið sum grundarlag við nýggjar samráðingar.

3) Angola:

Amerikanararnir halda, at sovjetsika uppileggingin í Angola til frama fyri MPLA frælsisrørsluna er brot á avspenningarpolitikkin. Tað mótmælir Kreml. Uppileggingin er ikki soleiðis háttað, at hon nervar avspenningarpolitikkin.

Suðureuropeisku javnaðarmenn sinnaðir fyri samarbeiði við kommunistar

Nærri samarbeiði millum javnaðarflokkarnar í Suðureuropa og sambandið við kommunistar vóru høvuðsevnini, tá javnaðarflokkarnir úr Fraklandi, Italia, Spania, Portugal, Belgia og Luxembourg møttust seinasta vikuskiftið í París.

Tað er tann franski sosialistaleiðarin Francois Mitterand, ið hevur kallað saman til henda fundin, sum er í sambandi við eina vend til vinstru í fleiri av teimum europeisku londunum við val seinastu árini. Hetta hevur ført við sær, at javnaðarstjórnir við stuðli frá kommunistum er ein komandi møguleiki.

Semja við kommunistar

Mitterand sigur, at teir suðureuropeisku javnaðarmenninir eru rættiliga ymiskir frá teimum í Norðureuropa. Ávirkanin frá katólsku kirkjuni, tann hernaðarliga áskoðanin hjá arbeiðarastættini og nógvar ferðir større kommunistaflokkar — Finland undantikið í Norðureuropa — ger, at tað er neyðugt hjá sosialistisku flokkunum sunnanfyri at fáa eina semju í lag við kommunistisku flokkarnar.

Mótvekt

Mitterand ynskir eisini at fáa eina mótvekt til tað norðureuropeisku javnaðarrørsluna, ið er meira antikommunistisk.



Francois Mitterand, ið var mótvalevni, tá Giscard d'Estaing varð valdur

Fundurin sendi tó einki kommuniqué út, tí luttakararnir ynsktu ikki, at fólk skuldu halda, at teir eru við at skipa teirra egna bólk.